

*Skúlin á Velbastað er tann fyrsti, ið er bygdur uttan stuðul frá landinum. Hann er eisini orsøk til, at skattaprosentið í kommununi hækkar næsta ár*

# Kirkjubøar kommuna hækkar aftur skattin

**Kirkjubøar kommuna hækkar skattaprosentið fyri aðru ferð á rað, og er skatturin nú á 20,5%. Orsøkin er, at kommunan sum tann fyrsta hevur bygt ein skúla uttan stuðul frá landinum, og henda íløgan hevur verið tung, sigur borgarstjórin**

KOMMUNUR
*Stefan í Skorini*

Kirkjubøar kommuna var tann fyrsta kommunan at byggja nýggjan skúla uttan fíggjarligan stuðul frá landinum. Hetta merkist nú á skattaprosentinum í kommununi. Fyri aðru ferð á rað er skattaprosentið hækkað, so at borgararnir nú lata kommununi 20,5% í skatti.

Annfinn Brekkstein, borgarstjóri í Kirkjubø, sigur orsøkina vera, at bygdaráðið hevur gjørt eina ógvuliga stóra og tunga íløgu í nýggjan skúla, umframt at fortreytirnar hjá kommununi vórðu endavendar, tá barnaansingin varð løgd út til kommunurnar at umsita.

– Vit máttu seta skattaprosentið upp fyri at reka kommununa forsvarliga, og tað hava vit gjørt stigvíst, sigur Annfinn Brekkstein, borgarstjóri í Kirkjubøar kommunu.

Hann leggur afturat, at borgarin merkir lítið til eina slíka hækking, og tað er m.a. tí, at botnfrádrátturin samstundis er hækkaður.

## Skúlin er kostnaðarmikil

Skúlin á Velbastað er tann fyrsti í landinum, ið er bygdur uttan stuðul frá landinum, eftir at stuðul til skúlabygging varð tikin aftur 1998. Hann varð tikin í nýtslu fyri hálvum øðrum ári síðani og hevur verið eitt tungt tak hjá kommununi.

Annfinn Brekkstein vísir á, at av teimum 220 íbúgvunum á Velbastað eru 86 undir átjan ár, og tí er tað av alstórum týdningi at hava ein vælvirkandi skúla og ansingarpláss.

– Raksturin hevur verið tungur vegna hesa íløgu, men eisini tí at landsstýrið valdi at leggja barnaansingina út til kommunurnar at umsita, sigur borgarstjórin, ið leggur afturat, at tað ikki verður pláss fyri stórum íløgum næstu árini. 38 børn eru á dagstovninum á Velbastað.

Tó nevnir hann, at høvuðskloakkin verður gjørd liðug í komandi ár, og ætlanin er at gera ein størri vatnbrunn í kirkjubø.

Annfinn Brekkstein vil tó ikki siga, at tað stendur illa til fíggjarliga í Kirkjubøar kommunu. Hann nevnir, at fíggjarætlanin komandi ár javnvigar við 5,5 milliónir krónur. Skuldin er 5,6 milliónir, so bygdaráðið skal tó ansa eitt sindur eftir, hvussu kommunan verður rikin.

# Rúsdrekkanýtslan í fastari legu

**Í fjør drakk hvør føroyingur í miðal 6,8 litrar av reinum alkoholi. Hetta er ein vøkstur uppá 0,2 litrar. Hagtølini vísa, at seinastu seks árini er nýtslan av alkoholi ikki økt stórvegis, men tykist at vera støðug**

RÚSDREKKANÝTSLA
*Stefan í Skorini*

Seinastu seks árini – frá 1995 til og við 2000 – hevur rúsdrekkanýtslan hjá føroyingum verið rættiliga støðug. Tó er ein lítil øking at hóma.

Nýtslan verður roknað sum reint alkohol fyri hvønn íbúgva, ið er yvir 15 ár.

Í 1995 nýtti hvør íbúgvi yvir 15 ár í miðal 6,4 litrar av reinum alkoholi. Næstu fýra árini var nýtslan 6,6 litrar um árið. Í fjør var hon komin uppá 6,8 litrar fyri hvønn íbúgva. Hesi hagtølini skulu takast við einum ávísum fyrivarni, tí tollfrí søla av rúsdrekka er ikki roknað uppí.

Hetta stendur at lesa í Árbókini fyri Føroyar, sum júst er komin út.

Tá nýtslan skal býtast upp í sløg av rúsdrekka, er tað sjálvsagt mest øl, sum verður drukkið. Í fjør drakk hvør føroyingur yvir 15 í miðal ár 62,1 litrar av øli, 7,2 litrar av brennivíni , 6,8 litrar av víni, og 2,5 litrar av ymiskum tollfríum rúsdrekka.

Tilsamans drukku føroyingar í ár 2000 2,2 milliónir litrar av øli, 250.000 litrar av brennivíni, 237.000 litrar av víni og 88.000 litrar av ymiskum tollfríum.

Tað sæst týðiliga, at nøgdin av tollfríum rúsdrekka er økt nógv seinastu árini. Í 1995 vóru bara 13.000 litrar av tollfríum rúsdrekka flutt inn í landið. Síðani er ein støðug øking farin fram, og í fjør var nøgdin 88.000 litrar.

## Grønlendingar fremst

Hagtølini vísa eisini, hvussu nógv føroyingar drekka samanborið við hini Norðurlondini. Meðan ein føroyingur í miðal nýtti 6,8 litrar av reinum alkoholi í fjør, nýtti ein grønlendingur heili 13,2 litrar av reinum alkoholi í 1999.

Danir eru ikki langt aftanfyri Grønland. Í 1999 nýtti ein dani í miðal 11,6 litrar av reinum alkoholi. Síðani kemur Finnland við 8,7 litrum í miðal fyri hvørt fólk um árið. Føroyingar nýta 6,8 litrar um árið, álendingar nýta 6,2 litrar um árið, sviar nýta 6,1 litrar, íslendingar 5,9 litrar og minstu nýtsluna sambært hagtølunum hava norðmenn, sum hvør nýta 5,5 litrar av reinum alkoholi um árið.


Casablanca Ristorante
Hugnalig nýggj Italiensk matstova
Vel millum 30 fjølbroyttar: *Forverðar, suppur, pasta, pizza, fiskaverðar, kjøtverðar, barnamenu og dessertir*
Opið er frá kl. 12.00
Borðbílegging á tlf 31 96 96
Casablanca Ristorante

Manhattan PUB & CAFÉ
Livandi tónleikur
Hóskvøldið & fríggjakvøldið
Manhattan PUB & CAFÉ
*Sverrisgøta • Tórshavn*
*Tel 31 96 96*

Býin – hvønn hósdag

Í Býin

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311234

Neil Brophy
er á Caféini til og við sunnudagin, har hann syngur um sínar ferðir kring knøttin, um góðar løtur v.m.





19. desember Déjà-vu
20. desember Unn Patursson Band
Tilboð í desember
Gløgg & holukøkur
kr. 40,-
livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25





HESA VIKUNA
Hóskvøldið DJ Marjon Petersen
Fríggjakvøldið ladies night DJ Marjon Petersen
Leygarkvøldið DJ Marjon Petersen
Fótbóltur á stórskíggja
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós 69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

PLATFORM discoteque

Klaksvíkar Klubbi Tlf. 455681

Shanghai
Bíleggið borð á telefon 223000 ella 457680

BAROK

NÁTT-BUSSURIN hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir: Tlf.286254

fk Mat-seðilin
Hósdagin 13. des.: Hakkibúffur
Fríggjadagin 14. des.: Nakkaflak
Leygardagin 15. des.: Oksasteik
Mánadagin 17. des.: Kjøtfrikadellur
Týsdagin 18. des.: Bankikjøt
Mikudagin 19. des.: Livur
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík





Í Býin - hvønn hósdag

Hafnia Lounge
Frá nú av fram til jóla hava vit m.a.
Gløgg kr. 30,-
Eplaskívur kr. 15,-
Stór vafla við róma og súltutoy kr. 15,-
Kaffi við dagsins køku kr. 38,-
Størri úrval á menukorti
Opið frá kl. 14.00
Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Bergmenn
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

Býin – hvønn hósdag